# Álit

## um skipan viðvíkjandi

## kropsbornum hjálpartólum

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

# Innihaldsyvirlit

INNIHALDSYVIRLIT ..... 1

FORORÐ ..... 2

ARBEIÐSSETNINGUR ..... 2

DEFINITIÓNIR ..... 4

VERANDI AVTALA VIÐ SAHVA ..... 5

LÝSING AV SJÚKLINGAGONGD ..... 5

LÝSING AV VIRKSEMINUM Í DAG ..... 6

BÍÐI- OG VIÐGERÐARTÍÐIR ..... 6

FORSORGARLÓGIN ..... 7

DISKUSSIÓN ..... 8

HVØRJAR BEINLEIÐIS LOYSNIR ERU ..... 9

ÁBØTUR Á HØLINI Á KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚSI ..... 10

NIÐURSTØÐA /TILMÆLI ..... 12

**Fororð**

Atfinningar hava mangan verið frammi um tær veitingar, ið verða veittar sjúklingum við kropsbornum hjálpartólum. Sjúklingum í Føroyum eru í boði ein konsulenttænasta veitt av Sahva Aalborg, meðan sjúklingar, ið verða visiteraðir til viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum altoftast fáa tænastu frá Sahva Keypmannahavn.

Sahva bandagistarnir hava viðtalu í Klaksvík og í Tórshavn. Arbeiðsumstøðurnar eru vánaligar.

Atfinningar hava eisini verið um langa viðgerðartíð hjá Almannastovuna í sambandi við umsókn um fíggjarligan stuðul til kropsborin hjálpartól.

**Arbeiðssetningur**

Tann 28. mai 2004, sendi Almanna- og heilsumálaráðið skriv til sjúkrahúsleiðslunar um at velja umboð til ein skjótt virkandi arbeiðsbólk.

"Endamálið hjá arbeiðsbólkinum verður at kanna um møguleiki er fyri at betra núverandi konsulenttænastuna til gagns fyri sjúklingarnar samtíðis sum atlit verða tikin til fíggjarligu karmarnar.

1. Arbeiðsbólkurin skal millum annað meta, um tað er gagnligt at broyta núverandi siðvenjuna við konsulenttænastu frá Sahva.

2. Tað eigur at verða mett, um tað í størri mun ber til at loysa nakrar arbeiðsuppgávur, til dømis hondverkaraarbeiði í Føroyum, fyri at minka um bíðitíðina hjá sjúklingunum.

3. Harumframt eigur at verða kanna, um tað er møguligt at betra málsgongdirnar í sambandi við bandagist-viðgerðina, soleiðis at sjúklingurin skjótast og best fær neyðugu viðgerðina.

*Seinasta freist fyri arbeiðinum við framtíðar konsulenttænastuni er mikudagin, tann 1. september 2004"*

Eftir tilmæli frá sjúkrahúsleiðslunum vóru hesi valdi í arbeiðsbólkin:

John Rødgaard, yvirfysioterapeutur, Suðuroyar Sjúkrahús

Marjun Poulsen, yvirfysioterapeutur, Landssjúkrahúsið

Jona Nielsen, fyristøðukvinna, Klaksvíkar Sjúkrahús

Almanna- og heilsumálaráðið hevur tikið sær av fyrisitingarliga arbeiðinum í arbeiðsbólkinum.

Arbeiðið hevur ligið stilt síðan mars 2005, og nú arbeiðið var tikið uppaftur í oktober 2006 hevur Karin Djurhuus, virkandi yvirfyrisoterapeutur, umboðað Landssjúkrahúsið.
Bólkurin hevur havt fleiri arbeiðsfundir og hevur eisini verið á Klaksvík Sjúkrahúsið og Landssjúkrahúsinum, har hugt hevur verið eftir fysisku umstøðunum. Fundir hava eisini verið við Sahva og Almannastovuna.

**Definitiónir**

Fyri at lætta um hjá lesarum, ið ikki eru kendir við økið, fylgir ein stutt lýsing av einstøkum orðum (Munksgaard Danmark: Kliniskordbog):

Orthopædi den del af lægekunsten, der behandler fejlagtige stillinger og bygningsfejl, såvel medfødte som erhvervede lidelser.

Orthopædisk skomager:
En, som fremstiller håndlavet skotøj, også kaldet håndskomager.

Bandagist: Håndværker, der fremstiller kirurgiske bandager og apparater.

Útbúgvingin til bandagist er sambært lýsingini hjá Sundhedsstyrelsen ein millumlong hægri útbúgving innan heilivág/teknik, og varir í 5½ ár. Útbúgvingin fevnir um 3 partar. Partur A er grundleggjandi verkstaðarlæra, tvs um amboð og tilfar, ið bandagistur brúkar. Partur B er ein kandidatútbúgving í ortopedteknikki, og fevnir bæði um tekniskar og medisinskar lærugreinir. Partur C fevnir um 2 ár Turnus.

Eftir loknað útbúgving kann ein verða innstillaður til góðkenning frá Sundhedsstyrelsen.

**Verandi avtala við SAHVA**

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur síðan 1970'ini havt samband við konsulentfyritøkuna Sahva. Galdandi samarbeiðsavtala á økinum er frá januar 1998 og er gjørd av táverandi Sjúkrahússtjóra Embætinum.

Avtalan inniber, at Sjúkrahússtjórin bjóðar høli í Klaksvík ella í Tórshavn, og rindar allar ferða- og uppihaldsútreiðslur. Avtalan er ikki tíðaravmarkað og kann av báðum pørtum sigast upp við 6 mánaðar freist.

Kostnaðurin fyri hesa tænastu er útreiðsluførdur á deild 5290 í roknskapinum fyri Klaksvíkar Sjúkrahúsi:

| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur í tkr. | 269 | 281 | 288 | 251 | 297 | 322 |

**Præcisering av málbólki /Lýsing av sjúklingagongd**

Sjúklingar, ið hava tørv á kropsbornum hjálpartólum, fevna um nógvar ymsar bólkar. Nøkur hava amputerað kropslimir, onnur hava brúk fyri einum korsetti til ryggin, og onnur klumpfótviðgerð. (her kann skrivast meira...)

Fólk, ið koma út fyri stórum óhappi, t.d. missa beinið í ferðsluvanlukku e.l. verða oftast send uttanlands til protesuviðgerð.

Ein annar málbólkur eru sjúklingar, ið verða amputeraðir á føroyskum sjúkrahúsum, sum ein avleiðingar av øðrum sjúkum, eitt nú sukursjúku.

Tá talan er um **beinamputatión** kann praktiska sjúklingagongdin lýsast soleiðis:

Aftaná skurðviðgerðina, er tað yvirlæknin, ið avgerð um sjúklingurin skal hava protesu. Koyristólur verður altíð umbiðin av terapeutunum. Um sjúklingurin skal hava protesu, sendir læknin ávísing til bandagist. Tað er læknin, ið avgerð, hvørt sjúklingurin skal sendast uttanlands til protesuviðgerð ella viðgerðin skal veitast í Føroyum.

Viðvíkjandi øðrum kropsbornum hjálpartólum, verður sjúklingurin vanliga ávístur av lækna til bandagist skipanina (í Klakvík). Í einstøkum føri, eru tað terapeutar ella sjúkrarøktarfrøðingar á sjúkrahúsunum, ið taka mát, men mest vanligt er, at fyrsta vitjanin hjá bandagisti m.a. snýr seg um at taka mát.

Tað er ymiskt hvussu long bíðitíðin er til at fáa kropsborna hjálpartólið.

**Lýsing av virkseminum í dag**

Sambært avtaluni, hevur Sahva bundið seg til árliga at veita 6 konsulentvitjanir , har bandagistur og ortopædiskur skómakari koma til Føroya. Hvør vitjan fevnir um eina arbeiðsviku. Vegna sparingar hava bert verið 5 vitjanir árliga.

Klaksvíkar sjúkrahús hevur sett ein Røktarfrøðing???? /skrivara í starv til at samskipa tænastuna. Talan eru um hálvtíðarstarv.

Vitjanin fevnir um 1 viku hvørja ferð. Mánadagur fer til ferðing frá Ålborg til Klaksvíkar. Viðtala er í Klaksvík týsdag, mikudag og hósdag. Fríggjadag fyrrapart er viðtala í Tórshavn. Heimferð er fríggjadag seinnapart.

**Bíði- og viðgerðartíðir til Sahva**

Tá ein sjúklingur fær ávísing frá lækna, verður hendan send til skrivaran, ið syrgir fyri at sjúklingurin verður innkallaður til viðtalu næstu ferð Sahva er í Føroyum. Miðað verður ímóti, at eingin sjúklingur kemur at bíða ov leingi, og ber tað í sær, at arbeiðsdagarnir hjá SAHVA eru sera drúgvir, meðan teir eru í Føroyum.

*Fleiri sjúklingar hava gjørt vart við ónøgd um at koma til viðtalu seint á kvøldi. Spurningur hevur eisini verður settur við, um tað er ein nøktandi tænasta til brúkaran, tá konsulentarnir eru ovbyrðaðir av arbeiði, og hava verið í gongd í næstan dag og nátt í fleiri samanhangandi dagar?*

Fyri at lætta um samskifti við Almannastovuna, tekur bandagisturin umsókn og ávísing við til Danmarkar, og sendir so hetta saman við kostnaðarmeting til Almannastovuna, ið síðan viðgerð umsóknina um stuðul til hjálparráð.

**Umsóknir um stuðul eftir forsorgarlógini**

Sambært grein 18, stk. 5 í forsogarlógini hevur Almannastovan heimild at veita persónum hjálparráð, sum eru avlamnir, hava varndi sjúku ella aldurstreytaðar veikleikar.

*Sum hjálparráð er at skilja alt, sum er kropsborið, medisin, brillur, protesur, parykkar, o.l. og sum ikki er endurnýtslutól.*

Treytirnar eru at viðkomandi er **avlamin** ella hevur **varandi sjúku- ella aldurstreytaðan veikleika.** Herumframt skal hjálparráðið verða

- **neyðugt** fyri at umsøkjarin kann verða verandi í vinnu/arbeiði, ella
- **avgerandi** bøtur um sjúkuna, ella
- **avgerandi** kann lætta um í gerandisdagum í heiminum.

Umsókn um hjálpartól skal vera skrivlig, og kostnaðarmeting frá útvegara skal fyriliggja eins og læknaváttan.

**Hjálpartólamiðstøðin/almannastovan**

Hjálpartólamiðstøðin viðgerð umsóknir um hjálpartól, meðan almannastovan viðgerð hjálparráð, tvs. "kropsborin" hjálpartól.

HTM hevur býtt sína málsviðgerð upp á

Bráðmál, vanlig mál, skundmál .....

Tað eru økisdeildirnar hjá Almannastovuni, sum umsita umsóknir eftir §18, stk. 5 í forsorgarlógini, herundir umsóknir um protesur, serligar skógvar, innlegg í skógvar v.m.

Arbeiðsbólkurin hevur havt samband við allar økisskrivstovurnar fyri at kanna viðgerðartíðir.

Økisdeildirnar hava ikki býtt umsóknir eftir § 18.5 (smærri hjálpartól v.m.) upp í skundmál o.s.fr., soleiðis sum HTM hevur gjørt. Á summari 2004 varð hetta økið býtt út til allar økisdeildirnar.

Økisdeildin í Tórshavn fevnir eisini um Vágoy og Sandoy. Áðrenn 2004 var viðgerðartíðin ofta upp til 6 mðr. Okkum er upplýst, at viðgerðartíðin í meðal er 14 dagar, ið er ein meting frá deildarleiðaranum og er ikki grundað á eina kanning.

Á deildini í Klaksvík verður upplýst, at umsóknirnar verða viðgjørdar sum "rein" viðgerðarmál. Men orsaka av arbeiðsbyrðu og væntandi starvsfólkaorku, kann tað taka longri tíð at avgreiða. T.d. kann nevast, at tann 20. desember verður upplýst at 7 óavgreiddar umsóknir eru til viðgerðar, harav er ein innkomin 16. november og 6 umsóknir eru frá 22. november. Sostatt kann staðfestast, at viðgerðartíðin er meir enn ein mánaður.

Økisdeildin á Tvøroyri hevur normerað 2 størv, men ber annað er sett. Upplýst er, at um tað ikki er beinleiðis upplýst, at talan er um skundmál, kann avgreiðslutíðin verða upp til 14 dagar. Skundmál verða tikin framum. Her verður annars upplýst at Almannastovan hevur góðar royndir við samstarvi við "Nordisk Håndskomageri & Design Aps", ið Almannastovan hevur eina munnliga avtalu við. Samskifti fer fram umvegis fótterapeut. Skómakarin kemur til Tvøroyri 8 ferðir um árið

Sambært upplýsingum frá Almannastovuni, eru útreiðslurnar til hjálparráð: (Her mangla tøl frá ALMU) – sum tit mugu rykkja eftir.

| **Útreiðslur** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|
| Sahva Bandagist | 861.398 | | |
| Sahva Håndskomager | 769.816 | | |
| Helios-Anatomic | 105.354 | | |
| | 1.736.568 | | |

| **Tal av persónum** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|
| Sahva Bandagist | 120 | | |
| Sahva Håndskomager | 95 | | |
| Helios-Anatomic | 6 | | |
| | 221 | | |

**Samandráttur og niðurstøður**

Arbeiðsbólkurin hevur havt fleiri arbeiðsfundir, eitt nú við Almannastovuna, Sahva og aðrar konsulentar. Endamálið hevur verið at lýsa mannagongd viðvíkjandi sjúklingagongd og málsviðgerð, soleiðis at tænastan kann betrast fyri sjúklingin.

Hóast arbeiðið hevur tikið tíð, kunnu vit staðfesta, at ávísar ábøtur longu er gjørdar. Eitt ítøkiligt dømi er, at eftir samskifti við Almannastovuna eru umsóknarbløðini broytt, so hesi eru greiðari og léttari at útfylla.

**Umrøða av møguligum loysnum**

Arbeiðsbólkurin er komin fram til sítt tilmæli við at seta spurningar, og gjøgnum samskifti í bólkinum, at umrøða møguligar loysnir:

*Er tað møguligt at seta ein bandagist í starv í Føroyska Sjúkrahúsverkinum?*

Eftir samrøður við eitt nú Sahva, verður mett, at tað eru ikki nóg nógvar uppgávur í Føroyum til eitt fulltíðarstarv. Harumframt er trupult at fáa bandagistar, bert 80 eru í Danmark, sí skjal ##. Útbúgving til bangadist tekur 5½ ár.

Menningin á hesum øki gongur eisini móti miðsavnan av uppgávunum, har nøkur fá privat feløg bjóða fram bandagist tænastur.

*Er tað møguligt at seta í starv lokalan hondverkara?*

Hetta vildi gjørt tað møguligt at hildið tænastuna nærri at føroyska heilsuverkinum. Møguligt vildi verið at gjørt smærri umvælingar í tíðarskeiðinum millum konsulent vitjanir. Eisini at taka støðu til, um brotin hjálpartól skulu sendast uttanlands til umvæling ella um tað ber til at gera umvælingar, ið halda inntil Sahva kemur næstu ferð.

Men í hesum sambandi sigur Sahva seg ikki kunna standa inni fyri vøruni, uttan so at teir hava gjørt hana sjálvir. So um lokalur hondverkari skal vera, skal hesin útbúgvast innan økið, og upplæringin skal skipast í samstarv við Sahva.

Hinvegin skal hædd takast fyri, at eingin trygd er fyri at persónurin verður verandi í starvi.

*Skulu vit skifta veitara ella halda fast við Sahva?*
Shava hevur verið veitari í mong ár. Samskifti hevur verið gott, hóast einstakar klagur hava verið.

Viðvíkjandi teimum sjúklingum, ið hava verið til viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum, verður Sahva ofta brúkt.

Tó er annar veitari, tá talan er um kropsborin hjálpartól til børn.

Í hesum sambandi hava vit havt samskifti við Ísland, Øssur.

Samanumtikið verður mett, at tað ber til at varðveita eina góða tænastu, við at halda fast við Sahva. Arbeitt eigur at verða fram í móti einum betri og leypandi samstarvi, um praktisk viðurskifti. Neyðugt at onkur í KS átekur sær hesa uppgávu

*Kunnu vit betra og stytta um málviðgerðina av umsóknum um stuðul?*
Viðvíkjandi málsviðgerð er støðan í dag, eftir tí vit munnliga fáa at vita frá Økisskrivstovunum:

| | |
|---|---|
| Tórshavn | 14 dagar |
| Suðuroy | 14 dagar |
| Norðoyar | 1 mðr |
| Eysturoy | 1 mðr |

Hetta er ov long tíð. Tá ið Almannastovan fær umsókn um kropsborin hjálpartól, er hendan umsókn frá serfrøðingi, og eigur tí at verða eitt "bráðmál". Fyri at lætta um, bæði hjá Almannastovuni og umsøkjara, eigur eitthvørt frámerki at vera, sum týðuliga sigur frá, at hetta er eitt bráðmál.

**Ábøtur á hølini á Klaksvíkar Sjúkrahúsi**
Fyri at veita eina nøktandi tænastu, er neyðugt at hava eitt vælútgjørt verkstað. Arbeiðsbólkurin vil mæla til, at velja eitt sjúkrahús og har gera nøktandi umstøður.

Arbeiðsbólkurin hevur havt samband við Sahva og biðið um úttalilsi um hvørjar ábøtur tey meta neyðugar, um hølini á Klaksvíkar Sjúkrahúsið skulu gerast hóskandi.

Niðurstøðan er at síggja í skjali ##, og snýr seg í høvuðsheitum um at tey fáa eitt høli afturat til slípumaskinu og útsúgving.

Neyðugt verður at fáa til vega tól og maskinur, um verkstaðið skal virka optimalt. Upprunaliga kostnaðarmetingin var uml. 110 tkr. Í sambandi við at álitið var skrivað, hava vit biðið um dagførdar prísir.

Telduútgerð má eisini fáast til vega. Hetta kundi eisini verið við til at bøta um og stytta tíðina tá umsóknir skulu útfyllast av Sahva, áðrenn tær verða sendar til Almannastovuna.

**Niðurstøða /tilmæli**

Tilmælini frá arbeiðsbólkinum verða knýtt at arbeiðssetningin, og eru hesi:

**Ad 1. Arbeiðsbólkurin skal millum annað meta, um tað er gagnligt at broyta núverandi siðvenjuna við konsulenttænastu frá Sahva.**

- At nýggj avtala verður gjørd um konsulenttænastuna frá Sahva
- At avtalan verður tíðaravmarkað
- At kanna verður um møguleiki er fyri, at nýta Sahva Keypmannahavn, í staðin fyri Sahva Aalborg

**Ad. 2. Tað eigur at verða mett, um tað í størri mun ber til at loysa nakrar arbeiðsuppgávur, til dømis hondverkaraarbeiði í Føroyum, fyri at minka um bíðitíðina hjá sjúklingunum.**

- At hølini í Klaksvík verða um-/útbygd.
- At neyðug amboð verða fingin til vega
- At øll viðtala fer fram í Klaksvík
- At ein teknikari verður settur í starv, møguliga sum parttíðarstarv

**Ad. 3. Harumframt eigur at verða kanna, um tað er møguligt at betra málsgongdirnar í sambandi við bandagist-viðgerðina, soleiðis at sjúklingurin skjótast og best fær neyðugu viðgerðina.**

- At hølini í Klaksvík fáa neyðuga telduútgerð
- At øll mál um kropsborin hjálpartól verða viðgjørd sum skundmál á Almannastovuni
- At umsóknarbløðini eru sjónlig og lætt atkomulig, t.d. á heimasíðum

Tórshavn tann ##. desember 2006

| | | |
|---|---|---|
| John Rødgaard | Karin Djurhuus | Jona Nielsen |
| Yvirfysioterapeutur | virkandi yvirfysioterapeutur | fyristøðukvinna |